VALGREINAR

# Eldraøkið

**Frithleif Olsen**
*valevni Sambandsfloksins í Eysturoy*



Tey eldru í samfelagnum, skulu hava rætt til ta hjálp tey hava tørv á, á teirra ellisárum. Tað er skylda hjá yngra ættarliðnum og teimum sum stýra landinum, at syrgja fyri tí. Tey hava lagt lunnar, undir tað samfelag, vit búgva í.

Síðst í farna ári, vóru vit vitni til tað vánaligu støðu heimahjálpin var í. Eldri og veik lógu óhjálpin heima við hús. Tey kundu lítla og onga hjálp fáa, tí ongir pengar vóru eftir til tað. Hetta er nakað, sum ikki eigur og má koma fyri í einum so framkomnum samfelag, sum vit so ofta kalla okkum.

Sambandsflokkurin góðtekur als ikki hetta. Sambandsflokkurin vil tí gera nakað við hetta álvarsmál, so vend kemur í.

Heimahjálpin skal sjálvandi virka til allar dagar, til tey sum treingja tað. Vit eru ikki harrar yvir nær og hvar hvør blívur sjúkur, men vit vita fullvæl at tey eldru og veiku treingja til hjálp, hetta er ongin nýggjheit fyri nakran.

Hetta hendir samstundis, sum loysingarflokkarnir frásiga okkum, útvið 400 milliónir krónur árliga av peningi. Við tað, at vit eru í ríkisfelagsskapi við Danmark, hava vit rætt til hesar pengar og vit hava eisini brúk fyri pengunum. Fólkapensiónin skal dagførast. Hon skal verða á støði við pensiónina í grannalondum okkara.

Tað skal loysa seg hjá eldri fólki, sum klára og vilja arbeiða, at verða á arbeiðsmarknaðinum, so leingi sum møguligt. Tí má skattatrekki verða á einum rímiligum støði, so at tað ikki er ein forðan fyri, at tey kunnu verða úti á arbeiðsmarknaðinum.

Sambandsflokkurin er trygdin fyri einum vælferðarsamfelagi.

Gott sambandsval.

# KYOTO – eisini okkara ábyrgd

**Carl August Arge**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy*



Kolsýruútlátini er ein tann størsta hóttanin mannaættin stendur yvirfyri. Vísindafólk eru á einum máli um hetta. Hendan hóttanin kann bert basast, um øll heimsins lond samstarva móti sama máli.

Eisini vit.

Alt tos um at vit eru so smá í hesum samanhangi er ábyrgdarleyst ørvitistos. Soleiðis kunnu øll siga. Hvør sær dálka vit lítið, men tilsamans eru vit við at forkoma okkum av hesi dálking. Tí mugu øll vera við til at loysa trupulleikan.

Við at átaka okkum skyldurnar í KYOTO sáttmáanum seta vit okkum eitt greitt mál at arbeiða framm ímóti. Vit gerast ein partur av loysnini.

Gera vit ikki hetta, so eru vit ein partur av trupulleikanum. Vit geva næsta ættarliðunum ein sera ljótan arv. Vit koma okkum í ringt orð - og kunnu vænta okkum við onnur lond revsa okkum við handilsforðingum og øðrum tiltøkum. Hvør vil samstarva við ábyrgdarleys fólk?

**Hvat kunnu vit gera?**

Vit hava óvmikið av orku rundan um okkum: vindur, streymur, alda og ikki minst ein flógvan sjógv alt árið. Tí er als eingin orsøk at hita okkara heim við olju. Tí kunnu vit minka um - og kanska heilt gevast - at nýta olju at framleiða elmegi við.

Íslendingar hava sett sær mál: at gerast heimsins fyrsta land sum als ikki nýtist olju. Teirra bilar og skip skulu í framtíðini nýta orku frá hydrogen brenning (brint). Vit eiga at samstarva við íslendingar á hesum øki og seta okkum sama mál.

Sjálvandi mugu vit tryggja okkum at hetta ikki forðar okkum at menna komandi oljuvinnuna.

Sjálvstýrisflokkurin hevur á síni valskrá at KYOTO sáttmálin skal umfata Føroyar.

Vel tí Sjálvstýrisflokkin.

Hvør kann? D kann!

# Eg hugsi um tykkum...

**Vilmund Jacobsen**
*valevni Tjóðveldisfloksin í Eysturoy*



Nú mín góði vinur, Súni í Hjøllum, ikki læt seg stilla uppaftur til løgtingsvalið hesaferð, heittu fólk í Nes kommunu á meg um at stilla upp. Eftir at hava ráðført meg við Súna og fingið hansara fulla stuðul, játtaði eg. Hetta er tískil fyrstu ferð, eg eri uppstillaður í Eysturoyar valdømi, her eg havi búleikast meira enn eina fjórðingsøld.

Hóast veljarakanningar siga, at sambandsflokkarnir standa til at vinna hetta valið, er eingin ivi um, at Tjóðveldisflokkurin fer at fáa umboð í Eysturoyar valdømi.

Øll valevnini á lista E hava sama møguleika at verða vald. Tann, ið fær flestar atkvøður, verður valdur. Avgerðin um, hvør kemur at umboða Eysturoynna á tingi eftir 20. januar, liggur í tínum hondum.

Í mínum arbeiði sum tíðindamaður, havi eg gjøgnum mong ár serliga tikið mær av vinnuliga partinum, bæði á sjógvi og landi. Tí havi eg eina holla vitan á hesum øki.

Eg virðismeti tað arbeiði, sum gjørt verður á skipsdekkinum og á flakavirkisgólvinum ógvuliga høgt. Tað er her, útflutningurin og samfelagsvirðini verða skapt. Saman við endurskapandi tilfeinginum í havinum, er tað á skipsdekkinum, í lastini, við bryggjukantin og á framleiðsluvirkjunum, at grundarlagið undir okkara samfelag verður skapt.

Hvør útróðrarbátur og hvør egnari eigur sín lut í skapanini av okkara vinnulívi og vælferð.

Eysturoyggin er lokomotivið á vinnuøkinum, og síðan vit fingu uppboðssølu á Toftum fyri góðum 10 árum síðan, hevur vinnulívið í oynni verið fyri stórari menning.

Men eitt nútíðarsamfelag er meira enn skip og fiskur. Hond skal takast um børnini og tey gomlu, sum slóðaðu fyri, skulu røktast á nøktandi hátt, tá ið tey ikki orka meira. Vit skulu hava ein góðan skúla og góðar útbúgvingar. Ungdómurin skal hava bestu kor til fjølbroytt frítíðarvirksemi.

Ein íløga í ungdómin, er ein íløga í framtíðina.

Tá ið eg havi latið meg stillað upp í Eysturoyar valdømi, er tað í fyrsta lagi fyri at fáa ávirkan á avgerðirnar, har karmarnir fyri øllum virksemi í landinum verða samtyktir, nevniliga á Føroya løgtingi.

Við tykkara stuðli á valinum, 20. januar, fái eg høvi á ein siðiligan hátt at bera tíni og míni sjónarmið fram á Føroya løgtingi.

# Trygdin skal økjast

**Rúna Sivertsen**
*Valevni Fólkafloksins í Norðoyggjum*



- Trygdin á sjógvi og landi skal økjast
- Nullhugsjónin um - at vit ongan skulu missa í ferðsluni - skal eisini verða galdandi, tá tað ræður um trygdina hjá sjófólki okkara
- Tunnils- og vegasambandið til bygdirnar norðanfyri verður bøtt, so farleiðin gerst trygg
- Somuleiðis skal ferðasambandið til útoyggjarnar gerast betri og tryggari

# Gransking

**Heidi Petersen**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Norðurstreymoy*



**Gransking sum grundarlag fyri menning**

Hvussu menna vit okkum sum tjóð og samfelag. Har er eitt av amboðunum gransking. Ástøðiligar kanningar um hvussu tað sær út í løtuni og hvussu er best at leggja til rættis í framtíðini. Henda gransking eigur at fara fram á øllum økjum, men serliga innan umhvørvi er neyðugt at koma í gongd. Granskingin staðfestir hvussu sær út í løtuni, men eisini vísir hon okkum hvørjar leiðir eru gongdar frameftir. Tað ber ikki til í framtíðini bert at elta sum fyri er slóða, vit skulu finna og ganga okkara egnu leiðir, og sjálvandi kann hetta gerast í samstarvi við onnur.

**Føroyar sum miðdepil fyri altjóða granskingarstovni**

Granskingardepil fyri havumhvørvi og veðurlagsbroytingar skal knýtast at Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Tjóðveldisflokkurin vil seta fram uppskot í Norðurlandaráðið um at stovna ein norðurlendskan granskingardepil fyri havumhvørvi og veðurlagsbroyting í Føroyum, og skal hann liggja á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Hesin granskingarstovnur vil gera Føroyar til miðdepil fyri Norðurhøv, og kann skapa eitt granskingarumhvørvi, sum fer at draga nógv virksemi til bygdina við sær. Fari er undir projectering av nýggjum Fiskivinnuskúla og havbúnardepili í Vestmanna og skal hetta arbeiðið verða liðugt 1. oktober í ár, og tá granskingardepilin kemur afturat, eru vit í Føroyum á altjóða støði innan henda part av granskingini í heiminum.



VALGREINAR

# Fullveldislandsstýrið dumpa í vælferðarpolitikki!

**Birgir Mohr**
*Sandi*



Fráfarandi landsstýri dumpaði í vælferðarpolitikki, tí tað raðfesti fullveldið og loysing fremst. At reypa av, at meira peningur er latin út, samstundis sum fólkið rópar eftir tænastum til óhjálpin fólk, týðir upp á, at her verður meira av peningi latin fyri minni tænastur, og tað er kleyvarskapur. Sjálvt undir stóru kreppuni fyrst í nítiárunum var heimahjálp til øll.

Nei, tað er neyðugt við einum nýggjum politikki, nýggjum løgtingi, nýggjari samgongu og nýggjum landsstýri, sum seta fólkið og tað góða samfelagið fyrst.

Loysunarorðini eru ein nýggj raðfesting og ein desentralisering av stovnum og virksemi annars. Og fyrilit má takast fyri útjaðaranum, annars fer hann at avfólkast enn meira.

Skal nakað høpi vera í, at leggja meira umsiting út til kommunurnar, so má fyrst ein kommunureformur gerast, og tað tekur tíð, og hesin má innihalda eina kommunala útlíkning eins og okkara grannalond longu hava haft tað í nógv ár. Ein kommunal útlíkning er neyðug, óansæð talið av kommunum.

Vil fólkið ikki broyta kommunustrukturin, ella tora politikkararnir ikki at løggeva fyri hesum, so má politikkarin taka hædd fyri verandi støðu og tillagast okkara nógvu, ójavnu og ofta smáu kommunueindum – og útjavnast má. At tvinga nakað ígjøgnum er sjáldan skilagott.

At løggeva, sum um vit bert hava 10 størri kommunur og harvið tvinga tær nógvu smáu at leggja saman – meira ella minni tilvildarliga, tað er ikki ein farbarur vegur, tí tað skapar ójavnar á vitalum samfelagsøkjum og óætlaðar og kanska eisini minni hepnar loysnir.

Hetta var ætlanin hjá nú kollsiglda landsstýrinum – hesin politikkur er sera farligur fyri okkum, sum búgva í útjaðaranum og í smáum kommunum. Vit vildu blivið teir stóru taparanir her. Tí krevst ein annar politikkur. Tað vil Javnaðarflokkurin – veljið Javnaðarflokkin 20. januar.

# Miðvíst ímóti sjálvstýri

**Sophus Edward Dal-Christiansen**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Allir føroyingar vilja klára seg sjálvar. Tað býr djúpt í okkum øllum. Tey flestu ynskja eisini, at vit fáa fult sjálvstýri. Men tað skal gerast uttan at blaka vælferðina fyri borð.

Einki sjálvstýri verður framt við uppgerðum og samanstoytum. Eitt føroyskt sjálvstýri skal náast við miðvísum arbeiði. Tað skal røkkast við stigvísum tillagingum, har alt fólkið lyftir eina felags uppgávu í sátt og semju.

Allir flokkar eru samdir um, at tíðin er farin frá Heimastýrinum. Allir flokkar ynskja meiri sjálvstýri. Og allir flokkar siga seg ganga inn fyri einum sjálvberandi búskapi.

Í einum sjálvbjargnum Føroyum er alneyðugt at dúva upp á samstarv við umheimin, og tá liggur sjálvandi best fyri at samstarva við Danmark og síðan næstu grannatjóðirnar.

Føroyingar fáa alt tað sjálvstýri, vit vilja hava. Tað hevur verið greiði boðskapurin úr Danmark. Trupulleikin hevur verið, at landsstýrið ongantíð hevur vitað, hvussu nógv sjálvstýri føroyingar vilja hava. Skulu vit koma víðari, mugu tær broytingar, ið gjørdar vera, hava eina breiða undirtøku í fólkinum.

Javnaðarflokkurin er borganin fyri einari tjóðskaparligari semju. Uttan okkum fæst eingin semja, sum bróðurparturin av fólkinum stendur aftanfyri.

Javnaðarflokkurin hevur eitt uppskot til ta tjóðskaparligu semjuna, sum kann orðast í einari stjórnarlóg. Sjálvstýri Føroya skal víðkast og styrkjast, og staðfestast skal, at vit frítt kunnu velja, hvørja leið vit ganga, tá ið vit eru komin ásamt um tað.

Neyðugt er, at flestøll kunnu taka undir við tjóðskaparligu semjuni. Tað kann gerast einfalt við at staðfesta ta støðuna, Føroyar eru í og samstundis gera greitt, hvussu føroyingar kunnu loysa seg úr ríkinum, um Føroya fólk einaferð kemur ásamt um tað.

Tá ið ein politiskur sáttmáli er gjørdur millum Føroyar og Danmark, ið viðurkennir londini sum tvær javnbjóðis tjóðir í einum felagsskapi, er sjálvstýrismálið loyst.

Tá kunnu vit arbeiða víðari við at menna hetta landið, ið vit øll eru góð við. Stigvíst og miðvíst.

# Rækjuflotin

**Edvin Joensen**
*valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy*



Eitt av eyðkennunum hjá undanfarnu samgongu er vantandi stýring.

Eitt dømi um hetta er kreppan í rækjuvinnuni. Rækjuflotin hevur farnu árini ført hópin av peningi til landið, og menn hava gjørt stórar íløgur í hesa vinnu. Hesi skip hava vunnið sær rættindi í fremmandum sjóøki, rættindi, sum eru mist tann dag henda vinna heldur uppat, og rættindi, sum vit einki hava goldið fyri. Hesir menn hava víst stórt hegni til at laga seg til nýggjar og broyttar umstøður, og hóast hesin floti hevur havt nøkur rakár, so vita vit ikki enn, um honum kundi verið lív lagað, um vit høvdu styrkt honum kappingarførið eina tíð.

Undanfarna samgonga hevur ført ein, eg vil kalla betongdogmatiskan politikk, sum minnir okkum á Rusland í farnum tíðum. Stuðul skal ikki latast, punktum. Men hvat við at stýra? Teir vóru jú settir til at stýra landinum.

Eg ivist ikki í, at um rækjuflotin hevði fingið somu sømdir í Føroyum, sum Mærsk fær í Danmark, so hevði tað verið ein stórur bati. Allar manningar hjá Mærsk sigla undir DIS skipanini, og spara harvið reiðarínum stórar upphæddir. Eg dugi ikki at síggja, at hvørki Mærsk ella Danmark eru verri farin av tí. Aðrir hættir tað almenna kundi brúkt, til at létta hesum flota um útreiðslur hansara, hava eisini verið nevndir.

Í staðin hendir tað sama sum fyri 10-15 árum síðani. Tey nýggjastu og mest framkomnu skipini fara fyrst, og hóra nøkur undan, verða tað tey elstu og vánaligastu skipini, ið ikki kunnu kappast við onnur.

# Tann stuttligi sambandsflokkurin

**Jógvan Arge**
*Valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi*



Valstríðið er eisini ein kapping um at vera stuttligur.

Summi royna at vera stuttlig við vilja, onnur verða til láturs av sínum royndum at tekkjast veljaraskaranum.

Jóhan í Kollafirði hevur boðið seg fram við hinum stuttliga flokkinum.

Men spurningurin er, um ikki Sambandsflokkurin liggur á odda í kappingini um at fáa láturin fram.

Ongin hevur nakrantíð hoyrt um, at størsti politiski flokkur í einum landi í síni tráan eftir valdinum hevur boðið seg fram við so luftigum lyftum.

Kaninin í sambandshattinum, tann hemmiligi skattalættin, sum ongin má fáa nakað at vita um, tí tey mugu ikki stjala hann frá Sambandsflokkinum fyri valið, slær allar rekordir.

Er Jóhan í Kollafirði ein stuttligur flokkurin, so er Sambandsflokkurin upp aftur stuttligari - fyri ikki at siga tann komiski flokkurin.

Tað ber ikki til, at ein slíkur flokkur fær álitisváttan á løgtingsvalinum 20. januar.

Fær hann tað, verður valúrslitið ikki stuttligt, men bæði komiskt og tragiskt.

Tí seta vit X við E.

# Eg vil IKKI straffa teg, tí tú gert nakað eyka!

**Torkil V. Rasmussen**
*valevni Fólkafloksins í Suðurstreymi*



Fólkaflokkurin fer altíð at vera tann flokkurin, ið stuðlar hugsjónini, at tað SKAL loysa seg at arbeiða! Sosialistiskar røddir og gamlar røddir úr sambandinum hava leingi spurt, hvar skattalættin hjá Fólkaflokkinum blívur av? Hetta er bert ein ábending um, hvussu lítið omanfyrinevndu bólkar hava fingið við! Skattalættar, hægri barnafrádráttir og lægri bensinavgøld eru veitt fyri uml. 100 mió. kr.,- í 1999 og 2000. SKATTALÆTTAR uppá 52 mió. kr.,- eru veittir í árinum 2003 og 71 mió. kr.,- í ár! Botnfrádrátturin er hækkaður uppí 22.000 kr.,- fyri ár 2004! Skattastigin hevur bert fimm bólkar nú í mun til átta í 1996.

Eg vil arbeiða fyri, at allar inntøkur skulu skattast eftir sama inntøkuskattaprosenti, sum samstundis skal vera ein skattalætti fyri allar vanligar inntøkubólkar í samfelagnum!

Tað kann ikki vera rætt, at fólk sum gera yvirarbeiði skulu verða toppskattað! Tað MÁ loysa seg at arbeiða! Setið tí valdagin x við lista A ella við eitt av valevnum Fólkafloksins!